# Jóannes Nielsen, Karsten Hansen og Harrin Jesus

ARNSTEIN NICLASEN



Tað orðkringa skaldið Jóannes Nielsen spyr í grein í Dimmu herfyri ein relevantan spurning: "Hvat vildi Jesus sagt til standin í dag?" - við lutvísari ábending til Karsten Hansen, sum eftir 40 ára samhuga og baksi mynstrar av úr Tjóðveldisflokkinum og fer við Miðflokkinum í staðin.

Jóannes, ið eg mestsum bara kenni gjøgnum hansara ritverk, undrast á mangt, og tað er væl skiljandi. Skald eru vanliga sannleikasøkjandi. So her eru vit almindiligu, ið eisini undrast nakað, í sama báti. Niðanfyri eru nevnd nøkur dømi frá monnum og kvinnum, sum hava maktina og tí halda seg hava sæð ljósið.

Ikki tí, maktin er komandi og farandi og ein hálur hólkur um at halda, sum Bjørnstjerne Bjørnson yrkti um Napoleon Bonaparte:

"Med sejr fra Moskva til
Kartagena
han dør dog ensom på
Sankt Helena".

**Journalistar**

Hvøkkur kom á okkara eminentu kyndlaberandi journalistar, táið fram kom í ljós dagsins tey døpru boð úr Jyllandi, at teir nú ikki longur kundu koma inn á journalistaskúlan í Århus við dumpikarakteri - á jøvnum føti við eitt nú grønlendingar, sum, við fjarstøðu teirra millum fámentu bygdarløgini undir ísbrúnni, ivaleyst bæði sárt ella ikki sørt mugu kenna seg sum heimføddar millum meginlandsins knassar, sum eitt nú føroyingar, niðri í "Gamle Danmark, som skal bestå, så længe bølgen ruller", og hvørs inuitiska málslind liggur fleiri ljósár burtur frá hinum norrønu málsgreinunum.

(Ynskið og uppskotið undan kyndlunum varð hetta: Ein føroyskan journalistaháskúla, takk!)

**Málfrøðingar**

Okkara evnaríki og hárfagri ungdómur fekk dumpikarakter í fjør í Pisa-kanningini, tí tey forstóðu ikki spurningarnar á "grótføroyskum", sum tey ungu sorgarbundin søgdu frá. Ein støða, sum helst hevur benið í lærar-anna "atstøðiliga námsfrymli" á mál-sóttreinsingar-støðini á Debessartrøð. Har ung og moyr vitanarsøkjandi verða avlúsað fyri møgulig "musisk gehør" í móðurmálsins bjargalendi av brósttrongum frøðingum – og við góðari løn. Og sum framvegis manna hópin av almennu málnevndunum – øll rikin saman úr somu ódn av samsintum.

(Ynskið til jólamenn landsins: Meiri studning til stuldur og grevstur í íslendskum orðum og gamlari tíð)

**Skúlalærarar**

Í úrvalsmeingi landstýrismanna eru bara 4 av 7 (t.e. umleið 60%), ið eru skúlalærarar. Í landsins stjórn er soleiðis greiður meiriluti á manningarlistanum – úr landsins besta stættarbólki. Tað er tí helst bæði synd og skomm, at talið ikki er heili 100%. Men vit kunnu tó hinvegin gleðast um, at talan er um enn eitt nýtt føroyskt heimsmet, skuldi eg heilsa og siga (!). Og at hetta talið er bara yvirhálað í teimum londum, har harðrendar herfylkingar hava tikið ræðið við valdið.

Eingin hevur vituliga nakað ímóti lærarum ella lærarinnum sum so, og sum vilja vera undirvísarar, og eg minnist enn við gleði aftur á eitt nú Sámal Petersen, lærara í føroyskum (granskara og søguforteljara av gudsnáði), og sum forrestin eisini eitt skifti var landsstýrismaður í mentamálum.

Men kanska – heldur onkur - hevði Pisa-uppdragið givið betri úrslit, um landsstýrismeirilutin sjálvur hevði verið á vakt í fakinum henda lagnudagin. Tí teir mugu saktans teljast millum teir bestu heilarnar í Norðurlondum - ikki sannheit? Men um henda metingin er eftirfarandi, so sigi eg bara sum Húshamar: "Gu' forbarmi seg fyri teir í Suðurlondum -!"

(Ynskið teirra: Fleiri milliónir til háskúlar og titlar til lærarinnur og lærarar.)

**Visión 2015**

Gamalt er, at funktionerar (nú eitur tað starvsfólk) avrika funktiónir (tað liggur í orðinum), sum tey fólkavaldu hava stungið út í kortið. Meðan politikararnir verða valdir inn á Ting og í landsins stýri vegna teirra gyllini visiónir um allar lutir. Men nú frættist, at starvsfólkini sita í torvum og togast við visiónirnar, meðan politikararnir sita hond undir kinn og bíða eftir øllum visiónunum frá funktionerunum. Og hava funktionerarnir tí nakra tíð eftir til at gera dagligu nyttuna? Ella segði nakar, denn øvuta verð?

**Ferðalið landsins**

Fátækt er í heiminum enn. Hóast fáment, so mugu vit eisini vera við, har hjálp er fyri neyðini. Alt gott um tað. Onkur milliónin er jú avsett til hetta hermótið.

Men hvussu hevði tú, mín tolni lesari, loyst hetta uppdragið? Jú vituliga, við at tikið telefonina ella sms'að til antin Hans Holm ella Hera Hammer, sum hava undirvíst í geografi í ein mansaldur í Hoydølum, ella kanska ringt til Reyðakross, sum eisini er inni á feltinum, og spurt um fátæk fólk og lond.

Men tað ger Tinganes ikki. Nei, hví ikki heldur fara út at ferðast fyri pengarnar, sjálvandi. Tað er jú eitt slag av hjálp til sjálvhjálp, ið eisini kann brúkast, ikki sannheit?

Amerikanska hervaldið hevur altíð eitt ávíst tal av albrynjaðum hernaðarflogførum á veingjunum - við landsins trygd fyri eyga. Og gamli garpurin, Winston Churchill, segði um teir djørvu Royal Air Force flogskipararnar undir krígnum hesi søguligu orð :"Aldri hava so mong, so fáum at takka fyri, so nógv!"

Men um tann stríða ferðingastreymin hjá aðalstætt landsins (teir óbeinleiðis valdu og tegnar teirra, settir av vinabondum) í Tinganesi kunnu hesi fyndarorð kanska við góðum vilja snøggast eitt sindur til, at:"Aldri hava so fá, so mongum at takka fyri, so lítið".

Tey ferðast til metropolarnar í Ameriku, um evropeiska meginlandsins stórstaðir og til sólstrendur Spanialands, Portugáliu og heilt yvir til fólkamilliardina í Indialandi.

(Ja, slík eru framtakskapp-ar landsins, ið sambært Regini Dahl: Sum dansa gólvleys annað jólakvøld við rættiligum bóndum - -)

**Karsten ivasamur?**

Jóannes fílist á, at Karsten hevur svikið hevdvunnin stavnhøld, ið sett vórðu av fedrum hansara. Og at Karsten tykist ótryggur í atgerðum. Men her haldi eg, Jóannes, at tú fert skeivur. Ikki tað, at ikki onkur tinglimur er betri smurdur við brosmulýsi um barkakílið (henda máliska finst ikki í móðurmálsorðabókini). Og tað kann væl vera at adrenalinið fer við Karsteni viðhvørt. Men stavnhaldið, ið hann setti sær sum ungur, hevur hann ikki broytt eitt vet við. Tað eg veit.

Ein rættur løgreglumaður hevur fyri sær hesar reglur - bæði á degi og nátt:"Ikki at missa yvirlitið og ikki at vera handlingslammaður". Og vit eiga nógvar dugnaligar politistar í Føroyum. At Karsten støðugt fylktist og var at finna í fremstu røð, havi eg skilt á feløgum hansara. "Sheriffurin" ber ikki orð fyri at óttast ella ivast, har ið og tá ið á stendur.

Hevur hann ikki eisini fingið hægstu viðurkenning og sømdargávu, sum givin verður av politivaldinum fyri áræði og dirvi, antin talan er um váða á landi, sjógvi ella í glerstoyttum líðum, táið talan er um starvsvrik ella at bjarga øðrum úr vanda?

Hevur nakar fíggjarmálaráðharri fyrr ella síðani (bókhaldari, revisor, advokatur, journalistur, lærari o. s.fr.) klára at minkað blokkin við einari krónu? Tíansheldur úti við 350 milliónum krónum. Og við munandi avlopi eftir í landskassanum øll árini?

**Tvær kvinnur**

Komist við tvær kvinnur, onnur var í landstýrinum og hin mong ár í tinginum og báðar hava av hjarta brúkt síni ár í truplum starvi fyri tey minni mentu og stjúkbørn samfelagsins. Um báðar er at siga, at tær hava ikki havt brúk fyri eyka sersømdum fyri kvinnur, fyri at verða hoyrdar ella at koma fram at í samfelagsmeldrinum.

Onnur var Karolina Petersen, sála, sum tordi at siga tað, hon meinti. Tað skal hon eiga "upp á hennara støv". Hon segði einaferð: "Táið Karsten sigur nakað, so ber til at skilja, hvat ið hann meinar við, og at aftan fyri orðini: Har stendur ein maður", sum hon tók til.

Hin er Karin Kjølbro. Hóast hørm um avgerð Karstens og ikki samd í hansara sannføring, so gav hon honum eitt skoðsmál í blaðgrein, sum tú skalt leita leingi eftir. Meistarliga væl formulerað og frágingin. A Sense of a Woman.

So, at skjaldmoyggjar og villini galtar Tjóðveldisfloksins ikki hava fangað ella forstaðið, at her lá flúrur á vandaleið í sambandi við støðu Karstens, sterka manni floksins, tað kann vituliga ikki passa.

**Grein 366b**

Her var í roynd og veru talan um eitt evarska lítið mál (tað kundi líka so væl verið útvert um, um ikki tveytabellin eisini skuldi galda fyri samkynd). Tí málið snúði seg í veruleikanum bara um - holdning og hugburð til avleiðingar málsins upp á longri sikt - og als ikki við politikk.

Og í staðin fyri, at varpa málið út til fólkaatkvøðu: "Gerið so væl, mínir veljarar, málið er tykkara!" So bleiv tingarbeiðið lammað í eitt hálvt ár, fjølmiðlarnir slevaðu av skaðafrøi, og sjálvræðisrørslan bleiv rivin sundur í sjálvdrápi. Jubil og fagnaðarróp frá vinnandi áskoðarafjepparunum í Tinginum hoyrdust um alt landið, og uttan at tingformaðurin lyfti aðra eygnabrúnna til átalu. Soleiðis eigur einki nýliga felt tingmál at viðgerast. Tað átti hvør høna at forstaðið.

Og sambandsfólk úr øllum flokkum kundu halda um búkin í skellilátri. Og tað er ikki fyrstu ferð at tað hendir, at sjálvstýrisskútan kom at venda øvutan veg, og at vitið og skilið svíkur hjá teimum, sum vilja taka sjálvstýrið fyri land og fólk. Tí í 1906 endaði sjálvstýrisvongurin sum: Brennivínsbørnini, hálva øld seinni sum: Kommunista-beistini og nú eina øld longur á leið í árinum 2006: Sum válandi vargar uttan siðvenju. Og vita bara: Um komandi hálvthundrað ár, fellir ein ungmoy tár – yvir sama skilið - (leysliga eftir Janusi). Meðan frumburðarrættur Føroya verður seldur fyri "eina skál av reyðum linsuvellingi".

Skriftin og fornuftin siga, at um tú nakrantíð skalt náa á mál: "So legg av tað, sum tyngir". Søren Kierkegaard sigur tað meiri avanserað:"Renn ikki ørindi í tilveruni, men set alla orku inn á høvuðsuppdragið".

Og er eitt nú politiska høvuðsuppgáva landsins: At gera ein brúkiligan altjóða flogvøll ella at fáa blokkin burtur, soleiðis at vit kunnu hyggja í eyguni á dønum uttan at blúgvast, so lat okkum gera tað!!

Og bið tey hoppa og renna, sum altíð skulu innflyta okkurt hissini útlendskt vandamál, sum kanska als ikki kemur okkum við.

**Men hvat hevði Jesus sagt?**

Ja, nú mundi eg gloymt spurningin. Og fyrst er at siga, at tað er eitt lyklaskriftorð, sum stendur í "The old book with black cover", og sum bæði jødar ella muhamedsmenn, ið enn knógva undir trældómi lógarinnar, als ikki vilja vita av enn í dag. Og hetta orðið ger allan munin:" Tí lógin varð givin við Mósesi, men **náðin og sannleikin** eru komin við Jesusi Kristi"(Jóh.1).

Jú, Jóannes, Jesus hevði helst eisini endurtikið setningin, um at geva Gudi tað, sum Guds er, og keisaranum tað, ið keisarans er.

Ja, kanska hevði Jesus eisini sagt, sum við samtíð sína - bara í okkara orðum: Við tann intellektuella vitjandi á náttartíð:" Maður, tær tørvar at verða loystur úr hasum akademiska haftinum og haminum - (Jóh.3)". Og við ta nýseku kvinnuna, eftir at hann hevði sett teir skaðafróu mennirnar skákmát, segði hann: "Kvinna, far í friði og synda ikki longur – (Jóh.8),". Og við tann illa á holdum komna og deyðadømda síðumannin á krossinum, ið slepti síni sjálvsverju og fordómum við hesum orðum:"Hevði tú vilja minst til mín – ". Og svarið varð hetta:" Vinur, í dag skulu vit báðir fylgjast - - (Luk.23)"

Nakað soleiðis, haldi eg - við allari respekt og fákunnu - at tann alsvikni Menniskjasonurin og einsami Galilearin, og sum tá á sinni í mannaeygum var staddur í markleysasta máttloysi - hóast allan mátt í himli og á jørð - hevði sagt við okkum í dag.

06.03.2007

## Víðsjónir og smalsjónir!

EYÐUN Á BORG



**Jú, at stava dugi eg, Dagfinnur!**

Keðiligt at noyðast at siga tað sjálvur, men eg góðtaki ikki slíkar ógrundaðar skuldsetingar.

(Eg skal ikki rætta nakað í tínum brævi.)

VÍÐSJÓN er eitt *nýyrði*, eitt frálíkt orð, sum onkur víðskygdur persónur hevur smíðað. Eg mæli øllum til at brúka hetta orðið.

Orðabókin hevur annars orðini, *víðsýni* og *víðskygni*. Tey hóska væl saman við nýggjyrðinum, víðsjón.

Sum lærari í enskum og donskum kenni eg sjálvandi væl orðið, vision, sum er hálvføroyskað til visjón. Latið okkum haldur heilføroyska orðið til víðsjón!

SMALSJÓN (heimagjørt orð): Jú, eg royni at verja borg, ta føroysku, sum vera man.

Í Føroyum (onkur er á flatlondum) er tó eitt lítið, løgið lið av smalsjónafólki, sum roynir at verja danaborg, og sum bert sær ljós í landsuðri. Fáa tey onkran loyniligan stuðul til sítt margháttliga málstrev?

BÓKSTAVARAÐIÐ: Øll mál hava sítt stavrað. Enskt hevur sítt, danskt hevur sítt, og føroyskt hevur sítt. Tað enska hevur t. d. ikki donsku bókstavirnar, æ og å. Tað føroyska hevur t.d. ikki q, w og å. Vit hava so t.d. ð og í, sum hini bæði ikki hava.

Í skúlanum havi eg lært tað danska og tað enska stavraðið, men ikki tað føroyska. Tað mátti eg læra meg sjálvur.

Sjálvandi skulu vit duga øll hesi trý stavrøðini, fyrst tað føroyska og síðani tað danska og tað enska!

Hevur onkur ætlanir um at blanda øll trý stavrøðini saman í ein vavgreyt?

E.S.: Takk fyri kvøðuna, gamli málvinur, og takk fyri talviðmerkingina, Jonhard!

Annars eru tjøldrini komin!

Við føroyamálskvøðu og víðsjónakvøðu